FISKIMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
23. september 2014
Mál: 14/00475-8
(at tilskila í svari)

Viðgjort:

Tygara skriv: 14/03058

***Góðkenningarskriv***

**Nýggj serstøk byggisamtyktini fyri sethúsaútstykking oman Gil, Hoyvík**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, hevur Tórshavnar kommuna sent Fiskimálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri sethúsaútstykking oman Gil í Hoyvík til góðkenningar.

Uppskotið snýr seg um skipan og bygging á útstykkingini oman Gil í Hoyvík. Økið fevnir um partar av matr. nr. 140a, 135a og 135b, Hoyvík.

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini, góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri sethúsaútstykkingina oman Gil í Hoyvík.

Víst verður eisini til ætlanarskrivið frá Fiskimálaráðnum, dagfest 4. september 2014.

Mint verður á, at hóast broytingin í byggisamtyktini er góðkend av Fiskimálaráðnum, so frítekur tað ikki kommununi at fáa til vega møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum.

Hjálagt byggisamtyktartekstur við átekning frá Fiskimálaráðnum.

Vinarliga heilsan

Ólavur J. Hansen
løgfrøðingur

Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI SETHÚSAÚTSTYKKING OMAN GIL

Orsøkin til hesa serstøku byggisamtyktina er, at Tórshavnar kommuna hevur fyrireika eina útstykking til sethús oman Gil í Hoyvík.

Økið fevnir um partar av matr. nr. 140a, 135a og 135b, Hoyvík og liggur í umráðispartinum A3 í 3. grundumráði.

Samlaða økið er 15.400 m2 til støddar.

Útstykkingin fevnir um 24 grundstykkir millum 306 m2 og 344 m2 til støddar, tvey fríøkir á 690 m2 og 620 m2 og 14 felags parkeringsøkir á tilsamans 400 m2. Hetta gevur í miðal 401 m2 fyri hvørt grundstykki við felagsøkjum.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til sethúsaøki.

1.2 at tryggja, at skipanin av økinum, verður sum sýnt í kortskjali 2.

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og partar av matr. nr. 140a, 135a og 135b, Hoyvík

2.3 Økið er uml. 15.400 m2 til støddar og liggur í A3-øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

2.4 Sambært kap. IV §7, í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, er A3-øki í 3. grundumráði lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvi er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri hvørt stakhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, eru 24 grundøkir á millum 306 $m^2$ og 344 $m^2$, tvey fríøkir á 690 m2 og 620 $m^2$ og 14 felags parkeringspláss á tilsamans 400 $m^2$. Hetta gevur í miðal 401 $m^2$ fyri hvørt grundstykki við felagsøkjum.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Mest loyvda byggistig 0,3

4.2 Mest loyvda nýtslustig 0,8

4.3 Útrokning av nýtslustigið er samsvarandi kap. IV, § 26, stk. 4 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

4.4 Mest loyvda hædd av húsum er samsvarandi kap. IV, § 7 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

## § 5. VEGIR OG PARKERINGSPLÁSS

5.1 Vegir skulu gerast sambært galdandi donskum/norskum vegnormum

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

6.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

7.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

**FISKIMÁLARÁÐIÐ**

| | |
|---|---|
| Mál nr.: | 14/00475 |
| Ætlanarskriv: | 4/9 - 2014 |
| Góðkent: | 23/9 - 2014 |
| Váttað: | [illegible] |




# Tórshavnar Kommuna

Byggi- og býarskipanardeildin

| | |
|---|---|
| Heiti: | Serstøk byggisamtykt; oman Gil |
| Viðmerking: | Skipan av øki |
| Skjal nummar: 2 | Journal nr: 14/03058 |
| Dagur: 21.05.2014 | Mát: | 
| Tekna: | MKJ/KF |
| Rættað: | |




## Tórshavnar Kommuna
Byggi- og býarskipanardeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heiti: | Serstøk byggisamtykt; oman Gil | | |
| Viðmerking: | Yvirlit | | |
| Skjal nummar: 1 | | Journal nr: 14/03058 | |
| Dagur:21.05.2014 | Mát: | Tekna: | MKJ/KF |
| Rættað: | | | |